# EDV skipanin til føroyska heilsuverkið – ein viðmerking

**D. P. HØJGAARD**
kommunulækni
Á Sandi



Hugaligt, at eitt ávíst orðaskifti um talgildu heilsuskipanina hjá føroyska heilsuverkinum hevur verið í útvarpi og bløðum seinastu dagarnar. Loyvi mær hetta lítla uppískoyti til kjakið.

Til Jensia av Rana talsmann fyri kommunulæknarnar í Havn havi eg ta viðmerking, at eg væl skilji, at havnalæknarnir ótolnast eftir tí henta amboði, sum ein EDV skipan er í arbeiði okkara. Neyðugt er at finna eina loysn á trupulleikunum sum skjótast. Kravið má eisini vera, at ein skipan til fulnar nøktar tann serliga tørv, sum kommunulæknarnir hava.

Eri tó ikki samdur við honum í tí áskoðan, at ein skipan burturav gjørd til kommunulæknarnar í Føroyum er gongda leiðin. Ein integrerað skipan fyri primeru heilsutænastuna (kommunulæknar, heimarøkt) og sekundera heilsutænastuna (sjúkrahúsverkið) er tað, sum verkætlanin hjá Heilsumálaráðnum byggir á. At hava tvær skipanir koyrandi verður ein verri og dýrari loysn.

Jenis nevnir, at trygdin er betri í eini skipan, har hvør kommunulækni hevur sín servara. Hetta er ikki rætt. Taka vit fysisku trygdina er hon eyðsæð betri rundan um ein servara í stóru verkætlanini enn fyri 30 servarar spjaddir út á 30 kommunulæknaviðtalur. Somuleiðis er truplari og dýrari at verja 30 servarar ímóti ágangi frá teldusnillingum í mun til hin eina. Arbeiðið at gera broytingar í skipanini, uppdateringar, er lættari í einum servara í mun til 30. Sama er galdandi fyri at arbeiðið við backup, goymslu av EDVtilfari. Hetta skal jú gerast loypandi.

Samanumtikið eru eyðsýndir fyrimunir, eisini fíggjarligir við einum servara fyri allar sjúklingar í Føroyum og einari journal fyri hvønn sjúkling.

Treytin er, verkætlanin heldur. At okkara partur av skipanini fæst at virka fullgott. Og at trygdin hjá sjúklinginum er í lagi. Tað er tí rætt at støðga à nù, gera støðuna upp.

Las við áhuga greinina hjá Hans Paula Strøm, landsstýrimanni. Hon er jalig og bjóðar til fund, orðaskifti um verkætlanina, soleiðis sum hon sær út nú. Hetta er í tráð við ynskið hjá Tórshavnar Kommunu . Hvør bjóðar til fundar?

# Viðmerkingar til Pisa-kanningina

**PÁLL POULSEN**



Einki hoyrist um fakliga innihaldið í Pisa-kanningini. Ætlaði mær ikki at vera sum Georg og sáa mistrúgv um hana eftir ordra frá Ib Auken ella Eilif, men hvat um spurningarnir veruliga eru so flatir at næmingarnir gjørdu gjøldur burtur úr sjálvari kanningini, og svaraðu býtt uppá býttar spurningar?

Føroyska samfelagið er so framkomið at vit hava hagdeild, ið fæst við at rokna statistikkir út. Eru Føroyar at meta við Meksiko og Brásiliu, ber til at gera samanlíkningar. Signifikansniveau, frávik og annað. N minus Q. Hvussu ber tað til at heimsins størstu fótbóltstjóðir eru at rokna saman við Føroyar? Ein kvart milliard fólk búgva í hasum londunum, so Hermann og teir eiga at duga at geva okkum eitt nýtiligt svar.

Ber tað til hjá einum danskara at kanna føroyska málið og støðuna hjá tí føroysku tjóðini? Hvat grundarlag standardiserar kanningina í hesum londum og hvat hava fólk í hesum londum til felags. Er tað veruliga so galið í 9 flokki, so hevur restin av samfelagnum álvarsligar trupulleikar. Man tosar um einskiljing, og eitt alment partafelag keypir eitt politiskt blað. Hvørki Groucho Marx, Buster Keaton ella Charlie Chaplin høvdu klárað at forskrekt fólk við sovorðnari ræðusøgu.

Í allari almennu fyrisitingini er trupulleikin at tey ódugnaligu royna at tilpassa veruleikan við ódugnaskapin. Komplementersannleikar verða lagdir út, soleiðis at tað passar betur saman allastaðni. Fólk ganga runt og spæla at tey eru so "paradoksal". Danska skipanin kúgar føroysku skipanina og danir skulu ikki koma her og vera ov stuttligir. Kinverjar á tí Lærda Háskúlanum í Roskilde vildu hava skúlapengarnar aftur, tí prógvini ikki samsvaraðu við innihaldið á útbúgvingunum. Kinverjar eru 1.6 milliardir í tali, danir 5 milliónir.

Konsekvensur er ikki at hóma nakrastaðni, og tey sum ikki sjálvi skilja at tey sjálvi gerast forðingin ímóti tí fakliga, tey liggja ívegin fyri samfelagsligari menning. Tey avtala tað sínámillum, kalla tað okkurt annað, uppfinna nýggj orð. Maktmisnýtslan gongur altíð út uppá at taka evnini at hugsa frá fólki. Klára tey ikki at hugsa sjalvstøðugt vegna maktmisnýtslu, endar alt í undirlutakenslum og ørvitið fær sítt egna lív. Fyri at koma uppúr hesum krevst ein uppdragandi mekanisma, t.d. kundi skúlin sloppið at uppdrigið børnini til at verið borgarar í landinum, men tað áttu foreldrini sjálvsagt at klárað sjálvi. Men spurningurin er so um tey sjálvi eru uppdrigin? Hví ringja summi fólk altíð til læknan mitt um náttina, hví fáa tey ikki pínu um dagin í vitjunnartíðini. Tað er uppdragilsið. Meiningin við einum skúla er at læra fólk, heldur enn at fungera sum ein all-out sosial skipan har tey frekastu og tápuligastu sleppa longst. Øll viðurskifti, serliga tey empirisku eiga at endavendast, soleiðis at vit kunnu koma á eitt hægri støði.

Veruleikin er tann at støðið í 9 flokkunum er hægri enn hjá fleiri av Ph. D unum á Debesartrøð. Hyggja vit so at pengunum og umstøðunum hjá 9 flokki, eru teirra odds ímóti teimum, meðan hini sleppa ígjøgnum, sjálvt um tey so dánt hava gonguvit.

Ein Ph. D í dag svarar til 7-8 flokk í sjeytiárunum, tá tosa vit um »hugvísindi«, sjálvt um talan ikki er um vísindi. Men eru skottini ikki tøtt, endar tað soleiðis.

Fremstu vognarnir í skúlaskipanini koyra enn tómir og annað forhjólið er punkterað.

# Visjón 2015 uttan Ferðslutrygd

**RÚNA SIVERTSEN**
Formaður í
Ráðnum fyri
Ferðslutrygd



Ráðið fyri Ferðslutrygd heitir á løgmann um at taka Ráðið fyri Ferðslutrygd við upp á ráð í arbeiðinum við Visjón 2015.

RFF veit ikki um nakar bólkur arbeiðir við ferðslutrygd í sambandi við Visjón 2015. Men Ráðið fyri Ferðslutrygd er í hvussu er ikki við, og tað halda vit vera heilt burturvið, serliga við atliti til, at ferðsluskaðar eru størsta hóttanin ímóti fólkaheilsuni í vesturheiminum.

Vegna Ráðið fyri Ferðslutrygd,

# Opið bræv til Hans Paula Strøm, landsstýrismann

**JOHN SIGURD JOENSEN**

1. Er Landssjúkrahúsið ein forrætning?

2. Skulu vit sjúku uttan fyri Havnina fíggja landssjúkrahúsið við teium 800 krónunum, sum tit stjala frá okkum sjúku, sum vit eiga í ferðaendurgjaldi? Peningurin er jú skattaður einaferð.

3. Hví skal Landssjúkrahúsið hava 800 krónur fyrst áðrenn vit sjúku fáa nakað ferðaendurgjald?

4. Hvat fara hesi pengarnir til?

5. Eg vil halla henda pening ein eykaskatt, hava tit loyvi at seta eina lóg í gildi, sum bert rakar tey sjúku uttan fyri Havnina?

H.P.S. vónandi hevur tú lisið journalina, sum eg gav tær loyvi til.

Einki at siga til, at Javnaðarflokkurin fer skramblandi niður í atkvøðum. Mína atkvøðu fær hann so ikki aftur!

**P. S.** Svara aftur her í Sosialinum sum skjótast, H. P. S.

# Opin spurningur til FSF viðvíkjandi avgerðini um HB

**JÓNFINN OLSEN**
Miðvágur



Sjálvandi skal FSF hava rós fyri arbeiði teir gera. Hinvegin skula teir eisini verða klárir, um teir koma at gera eitt misstak at viðurkenna hetta.

**1.**
Kappingarnevndin hjá FSF ger eina niðurstøðu um at koyra málið um HB til aðalnevndina í FSF, nú hevur kappingarnevndin longu tikið eina avgerð. Hevur kappingarnevndin ikki loyvi at taka hesa avgerð, má tað verða kappingarnevndin sum skal revsast fyri hetta (»ella fáa eina nøs«).

**2.**
Aðalnevndin tekur tað støðu at HB skal koyrast úr steypakappingini grunda á at hava nýtt ein leikara, ið ikki eftir teirra meting hevur leikaraloyvi ílagi.

**3.**
HB kærir til Dómsnevndina sum tekur tað avgerð at HB skal verða verandi í steypakappingini.

Eftir Grein 42 hjá FSF, ið er soljóandi

**GREIN 42**
»Allar avgerðir hjá dómsnevndini eftir hesum reglum eru endaligar og kunnu ikki kærast til aðrar myndugleikar ella leggjast fyri dómstólarnar.«

Her sæst tíðiliga og klárt at avgerðinar hjá Dómsnevndini eru endaligar, kunnu ikki kærast ella leggjast fyri dómstólarnar. Tá hendan avgerðin er endalig so kann hon vælsaktans heldur ikki takast aftur og viðgerast av nýggjum, sum gjørt er í hesum føri, ella hvussu???

**4.**
FSF letur nú hetta mál fáa loyvi at ganga umaftur og tískil verður málið latið kappingarnevndini til støðutakan fyri aðruferð.

**5.**
SPURNINGURIN er nú,

**5.1.**
hevur FSF avtikið dómsnevndina hjá sær sjálvum???

**5.2.**
hevur aðalnevndin hjá FSF av sínum eintingum strika Grein 42 í lógum sínum???

**5.3.**
og til síðst men ikki minst, hevur aðalnevndin hjá FSF lagt seg út í kappingina í 2006 soleiðis at nú verða fleiri onnur feløg koyrd úr landskappingini í Føroyska fótbóltinum???

**6.**
Tí antin hevur tann Føroyski Fótbólturin eina lóg at halda seg til ella ikki. Hetta mál er tikið til viðgerðar av FSF sjálvum (tað kunna teir eisini í serligum førum, í fylgið Grein 39. stk 3.) og síðan hava teir viðgjørt tað eftir at kærufreistin var farin, tað er so ikki at finna í lógini hjá FSF at teir kunna bera seg soleiðis at fram um onnur.

Undirritaði fer her at heita á FSF forsetan Óla Holm umboðandi aðalnevnd FSF's at svar alment í bløðunum uppá hesi viðurskiftir, so allir Føroysk fótbóltsáhuga kunna fáa at vita hvat gongur fyri seg her.

Samstundis vil undirritaði vísa til mína fyrr skrivaðu grein í milunum um hetta mál (avrit av henni er sent saman við hesi grein til milarnar).

Við ynski um góða eydnu, skjótt svar og einaferð um eitt framhaldandi gott ítróttarligt ríkt fótbóltsár 2006, (tað sum eftir er av tí).

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!